## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 24. januar 2024, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen |
| **Skrivari:** | Rúna Ingunardóttir |

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, eru tvey nýggj mál innkomin. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málini verða sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málini vórðu sett á skrá sum mál nr. 256 og 257

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 243**
Broyting í samstarvsavtaluni viðv. Heimatænastuna í VEKS
J.nr.: 10000000-1-2024

Stýrið fyri Heimatænastuna í VEKS hevur á fundi tann 6. desembur 2023 einmælt samtykt at broyta § 7 í samstarvsavtaluni soleiðis:

Verandi orðing:

> *"Dagliga umsitingin í samstarvinum liggur inni í samstarvinum, við høvuðssæti í Vestmanna"*

Verður broytt til:

> *"Umsitingin er staðsett sum partur av virkseminum hjá Heimatænastuni í VEKS."*

Heitt varð á einstøku kommunustýrini um at viðgerða hesa broyting.

**Viðv. 249**
Uppskotið at broyta viðtøkurnar fall.

**Mál 250**
Eykajáttan til arbeiðir sum verða flutt til 2024
Seyðahús hjá Fjalshaga (j. nr. 8201002-4-2020) og Fiskastykkið (j. nr. 509062-1-2020)

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. januar 2024 mál um eykajáttan til at inniloka seyðahús til Fjalshaga afturfyri lendi til Fjalsveg og at gera parkeringspláss á fiskastykkinum í Toftabø.

Fíggjarnevndin mælti til at samtykkja eina eykajáttan, sum verður fíggjað við tøkum peningi.

Upphæddirnar eru hesar:

1. Seyðahús kr. 276.600
2. Fiskastykki kr. 400.000

**Viðv. 250**
Eykajáttanin varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Mál 251**
Umsókn frá Summartónum 2024
J.nr.: 2000002-46-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. januar 2024 mál um stuðul til Summartónar 2024.

Í telduposti dagf. 18. desembur 2023 sendi Summartónar umsókn um stuðul.

Summartónar 2024 fara at skipa fyri trimum konsertum í Vestmanna við møguleika at leggja nakrar afturat.

Søkt varð um kr. 11.500.

Nevndin mælti til at stuðla við kr. 11.500.

**Viðv. 251**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

**Mál 252**
Umsókn frá VÍF kappróður
J.nr.: 2000002-2-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. januar 2024 mál um stuðul til VÍF Kappróður.

Í telduposti dagf. 9. januar 2024 sendi VÍF Kappróður, umsókn um stuðul til fjarðastevnuna umframt til íløgur og viðlíkahald.

Nevndin mælti til at stuðla við kr. 25.000 samanlagt.

**Viðv. 252**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

**Mál 253**
Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 276e
J.nr.: 104002-1-2024

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 17. januar 2024 umsókn um sundurbýti av matr.nr. 276e, Niðari Vegur 63.

Nevndin mælti til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 253**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt

**Mál 254**
Áseting av almennu fundardøgunum fyri seinna hálvar 2024
J.nr.: 22022-3-2020

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, heitti á bygdarráðið um at áseta almennu fundardagarnar hjá Vestmanna Bygdarráði seinna hálvar 2024 til hesar:

- Mikudag	28. august	kl 17:00
- Mikudag	25. septembur	kl 17:00
- Mikudag	30. oktobur	kl 17:00
- Mikudag	27. novembur	kl 17:00
- Mikudag	18. desembur	kl 17:00

**Viðv. 254**
Fundardagarnir vóru einmælt samtyktir

**Mál 255**
Framtíðar møguleikar í smb. við umvæling av Vestmanna skúla
J.nr.: 8220002-2-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. januar 2024 mál um Skipanaruppskot til Vestmanna skúla.

Nevndin samtykti at leggja skipanaruppskotið fyri Bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 255**
Bygdarráðið samtykti einmælt skipanaruppskotið.

**Mál 256**
Keyp av gravimaskinu
J.nr.: 8311002-1-2024

Bygdarráðið setti kr. 390.000 av á fíggjarætlanini fyri 2024 til at langtíðarleiða eina gravimaskinau.

Ístaðin fyri langtíðarleigu, mælti umsitingin til at gera eina keypsavtalu ístaðin. Kostnaðurin fyri gravimaskinuna er kr. 1.025.000.

Mælt verður til at umraðfesta kr. 390.000 av rakstrinum hjá Maskinhøllini til løgujáttan hjá Maskinhøllini.

Tað mangla sostatt kr. 675.000 við eini umraðfesting ella eini eykajáttan.

**Viðv. 256**
Bygdarráðið samtyktið einmælt umraðfestingina av rakstrinum til løgujáttan umframt eina eykajáttan á kr. 675.000, sum verður fíggjað við tøkum peningi

**Mál 257**
Val av nevndum og umboðum
J.nr.: 22042-1-2020

Í telefonsamrøðu tann 23. januar 2024 heitti stigtakari, fyri grunnin fyri Ólavur VN138, á Bygdarráðið um at velja eitt umboð í stýrið, áðrenn stovnandi aðalfundin hjá grunninum.

Grunnurin fyri Ólavur VN138 hevur til endamáls at seta okkara søguliga træskip "M/S Ólavur" í uppruna stand.

**Viðv. 257**
Bygdarráðið samtykti einmælt at velja borgarstjóran í stýrið.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 17:45

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen